

Stuttligt, lætt og eitt sindur nostalgiskt...





*– Í flestu førum snýr framførslan á ólavsøku seg um at minnast aftur á tað, sum hendi. Talan verður um skemt og nostalgi – hvørt um annað, sigur Ria Tórgarð, sum saman við Barbaru Christophersen leikstjórnar »Postkort úr Havn«*

# Sjónleikur: »Postkort úr Havn«

**Tað verður eingin kabarett á ólavsøku í ár, men í staðin eru Havnar Sjónleikarafelag og Tjóðpallur Føroya farin undir eitt samstarv um leik, tey rópa »Postkort úr Havn«. – Vit fáa ein fínan leik, sum bæði verður lættur, stuttligur og eitt sindur nostalgiskur, sigur Ria Tórgarð, annar av leikstjórunum**

Nú Tórshavnar kommuna hevur hundrað ár á baki sum fólkavald kommuna, hava Havnar Sjónleikarafelag og Tjóðpallur Føroya samstarvað um ein leik – ella myndir úr Havn - ið tey hava sett saman sum eina heilsu til høvuðsstaðarkommununa á ólavsøku.

- Bæði Havnar Sjónleikarafelag og Tjóðpallur Føroya hava gott samstarv við Tórshavnar kommunu, sum stuðlar okkum væl. Nú kommunan hevur hendan ársdag, eru vit farin til verka.

Jenny Petersen, leiðari í Tjóðpalli Føroya, sigur, at eitt av teirra høvuðsmálum er at stimbra áhugafeløg kring um landið, og í hesum førinum hava tey latið leikstjórar, sum eru Ria Tórgarð og Barbara Christophersen, til leikin ella myndirnar, sum fyrstu ferð verður sýndur í Sjónleikarahúsinum ólavsøkuaftan klokkan 20.

## Pallsamstarv

Tjóðpallur Føroya sendir soleiðis leikstjórar út til áhugafeløg, og samstundis eru áhugaleikarar eisini við í leikum hjá Tjóðpalli Føroya. Á henda hátt fæst ein synergi-effekt í føroyskan sjónleik.

- Vit hava skilt, at eingin var áhugaður í at gera kabarett í ár, og tí vendi Havnar Sjónleikarafelag sær til okkara um íblástur.

Jenny sigur, at umframt at veita sjónleikarafelagnum leikstjórar, er tað Mina Reinert, sum í samráð við leikararnar hjá Havnar Sjónleikarafelag, ið skrivar uppskotini til smáu brotini í leikinum.

- Katrin Bonde er búnasniðgevi hjá okkum, og hon stendur fyri klæðunum hjá leikarunum. Sjálvum pallinum og pallmyndunum tekur Anna Suffía Egilstrøð, sum er í nevndini í Havnar Sjónleikarafelag, sær av.

## Ymiskar hendingar

Ria Tórgarð sigur, at »Postkort úr Havn« verður ein fínur leikur, sum hon tekur til. Hetta verður bæði lætt, stuttligt og eitt sindur nostalgiskt.

- Leikurin ella myndirnar snúgva seg um hendingar í Havn í áttati- og nítiárunum og upp til okkara dagar. Tað er nógv hent hesi árini. Samskiftistøknin er nógv ment, og fólk eru vorðin meira tilvitað.

Leikstjórin sigur, at tey hava havt ein bólk á eini 10-12 fólk, sum í fyrsta lagi hevur verið mannaður við limum úr Havnar Sjónleikarafelag. Hesi hava so tosað saman um hugskot, hvørji evni hóskandi eru at taka upp í ymisku tíðarskeiðunum, og síðan hevur Mina Reinert verið við og hevur gjørt síni uppskot til rammusøgurnar fyri at fáa alt at hanga saman.

## Eisini hugvekjandi

Hon vísir á, at tó at leikurin – ella myndirnar – í flestu førum eru ógvuliga lættar og stuttligar, verður eisini nomið við álvarsomu kreppuna, sum rakti Føroyar fyrst í nítiárunum.

- Í flestu førum snýr framførslan seg um at minnast aftur á tað, sum hendi. Talan verður um skemt og nostalgi – hvørt um annað, leggur hon aftrat.

Ria Tórgarð sigur, at einir 17 leikarar verða á pallinum umframt einir 3-4 tónleikarar, sum fara at spæla aukustiskan tónleik.

Myndir úr Havn verða eisini sýndar í sambandi við stuttu brotini so hvørt, sum leikurin gongur, og eitt nú eru myndir av fleiri handlum í høvðsstaðnum.

- Fyrsta sýning verður í Sjónleikarahúsinum ólavsøkuaftan klokkan 20, og onnur verður ólavsøkudag – eisini klokkan 20, sigur annar leikstjórin til »Postkort úr Havn«.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Mynd: Álvur Haraldsen*




